BØNARLØTAN

NOVEMBER 2026 41. árg.

1. Sunnudagur *Op. 9.1-21*



Benjamin og Wina Hansen við børnunum

TÝSKLAND, Hückeswagen, Ethnos 360
Wina og Benjamin Hansen
Noah Elias 14, Adrian 2, Amelie 2

Vit gleðast um, at vit nú eru vorðin fosturforeldur hjá tvíburunum. Bæði hava serligan tørv. Biðið um vísdóm og styrki til uppgávuna, at børnini mennast væl, kenna seg trygg og elskað og fram um alt koma at kenna Harran. 18.-19. nov. møtast ung, sum ætla at virka uttanlands næsta ár. Biðið, at Gud gevur vísdóm at vísa

teimum á røttu plássini. 19.-20. nov. vitja nakrir stutttíðartrúboðarar, sum vórðu sendir út í fjør. Vit vegleiða og stuðla teir, nú teir venja seg við lívið í Týsklandi og Eysturríki aftur.

KRINGVARPIÐ
15. nov. Sjónvarpsmøti, Samfelagsstevnan við Tjarnir
1. & 22. nov. Sjónvarpsandakt, Sámal Mikkelsen

EVANGELISKA RØDDIN – Aldan (meir á www.evr.fo)
Sunnukv. kl. 21 Kelduvaðið (endursent hóskv. kl. 21)
Týskv. kl. 21 Á torginum (endursent sunnud. kl. 12.30)

SAMFELAGSSTEVNAN við Tjarnir 4.-8. nov.
Stroymd: Frí. 6. nov. kl. 19. Leyg. 7. nov. kl. 15 og kl. 19. Sun. 8. nov. kl. 16 og kl. 19.

2. Mánadagur — *Hagg. 1.1-15*

OM Føroyar
Margareth Djurhuus, landsleiðari



Vit takka Harranum fyri framíhjárættin at senda samverkafólk út til tey minst náddu. 1. nov. fór Levi Hammer úr Havn til Japan at tæna saman við Shino og Halli Mortensen í 3 mán. Joey og Atli Olsen og dóttirin Lilja fyrireika seg at fara til Japan sum trúboðarar í feb. 2027, fyribils í 2–3 ár. Joey er úr Singapore, og Atli er hvalbingur. Margareth luttekur á ELM-stevnuni (European Leaders Meetings) í Týsklandi 2.-6. nov. Norðurlendsku OM-nevndirnar hittast í Kbh. 6.-8. nov. OM hevur bás á samfelagsstevnuni við Tjarnir 6.-8. nov. Práta við okkum um møguleikarnar at vera við í verkinum – heimanífrá ella úti í heimi.

USA, New Tribes Mission, Alabama
Judy og Óli á Grømma Jacobsen



Takk fyri dagarnar heima. Vit verða í Florida 2.-6. nov. Eg undirvísi einum bíbliubólki í Montgomery minst eina ferð um mánaðin, skal eisini tala á einum møti har og hitta menn í leiðsluni hjá NTM.

3. Týsdagur — *Hagg. 2.1-23*

NTM – FØROYAR
Noomi og Eli Christiansen
Tabita 12, Debora 11, Natan 8



5.-16. nov. taka Noomi og Eli lut á altjóða fundi í Indonesia um trúboðan. *Reach* verður 18.-22. mars 2027. Tilmelding á www.ntm.fo frá 1. nov. 2026.

FILIPSOYGGJAR,
Puerto Prinsessa
Cathy og Jógvan J. Rasmussen



Jonathan, umsetari hjá mær gjøgnum nógv ár, hevur fingið staðfest prostatakrabba og skal leggjast undir skurð í nov. Hann er liðugur við NT og skuldi leggja síðstu hond á 1. og 2. Mós. og lata til prent.

ZAREPTA
Seniorlega 13.-15. nov. Samkomulega, Nebo, 20.-22. nov.

4. Mikudagur — *Op. 10.1-11*

Varðin í Aalborg
Møtini síðan summarsteðgin hava eydnast væl, tí nóg nógv hjálparfólk hava tikið virknan lut. Biðið, at møtini framvegis verða væl stuðlað, so Varðin verður eitt stað, har fólk koma at kenna Harran. Møti verða 6. nov. á Peterborg Vej 35B og 20. nov. á Niels Ebbesens Gade kl. 19.



FØROYAR
– Else og Poul Johan Djurhuus
– Khuldah og Sámal Mikkelsen, Samuel 12
– Dora og Niels Pauli Nónstein

5. Hósdagur — *Op. 11.1-19*

LOGOS HOPE
Margareth Djurhuus, landsleiðari
Rúsurin eftir vitjanina hevur ikki lagt seg enn, og tað er gott. Jóhanna H. Olsen, Sámal T. á Lakjuni og Martha Ólavsdóttir trívast væl, hóast nógv er at gera. Tey eru undirmannað á fleiri økjum, og tí er stundum trupult at finna tíð til bøn og bíbliulesnað. Einstaklingar og familjur vísa áhuga fyri at fara umborð í tænastu. Biðið fyri øllum hesum. *Logos Hope* fer úr Liverpool til Isle of Man 5. nov.

USA, North Carolina
Charlotte, Calvary Church
Gudny og John Munro
Heystið er nú komið, og vit eru glað og takksom fyri allar møguleikar, vit hava at tæna Harranum, at uppbyggja Hansara stóra flokk, bæði børn og vaksin.

6. Fríggjadagur — *Mal. 1.1-14*



MEKSIKO, Mixtec, Oaxaca
Inga McKendry
Eg takki fyri tíðina saman við vinum og familju í Skotlandi, har eg var hjá eygnalækna fyri grønstar, og støðan er tíbetur ikki versnað. Vit hava givið út Kol. og Filemon umframt nakrar lesi- og skrivibøkur. Vit fyrireika nú bók til fólk, sum lesa spanskt, men skulu læra at lesa mixtec. Biðið, at fleiri lesi- og skrivibøkur koma út. Vit halda fram at endurskoða 1. Jóh.

USA, Nebraska, Ethnos 360
Rachel og Peter Hansen
Vit verða í Indonesia til NTM-leiðarafundir og eitt forum fram til 18. nov. Biðið fyri ferðini, og at vit hava vísdóm í tænastuni.

MEKSIKO, Michoacán, Puruandiro
Hansy og Martin Tuohy
Jónatan 17, Markus 14,
Evita 11, Joy 9
Vit gleðast um, at uml. 35 børn koma til bíbliubólk leygardagar, og at nóg nógv hjálparfólk eru.

MEKSIKO, Maravito
Isabel og Edy Mora
Marianna 0

7. Leygardagur — *Mal. 2.1-17*

ÍSLAND, Reykjavík, Akurinn
Rósa og Jógvan Purkhús
Akureyri, Sjónarhæð, Ástjørn

Biðið, at Gud varðveitir Ástjørn og signar verkið har. Ástjørn varð stovnað í 1946, og tjóðgarðurin, har Ástjørn er, varð stovnaður í 1973. Tjóðgarðurin hevur nú alskyns reglur, og vit møta mótstøðu frá ávísum har. Biðið, at myndugleikar og onnur vísa góðan vilja mótvegis Ástjørn.

DANMARK, Hirtshals, Malta
Anna og Hans Djurhuus
Føroyskt møti verður leygard. 7. nov. í Bethaniakirkjuni, Dag Hammarskjøldsgade 2b í Aalborg. Biðið, at Harrin signar orðið, ið talað verður.



8. Sunnudagur — *Mal. 3.1-4.6*

FØROYAR
Shamila og Høgni Johannesen
Biðið áhaldandi, nú vit arbeiða við enska STEVN. Smálutirnir eru nógvir, og tað krevur nógva tíð og orku. Biðið fyri møtunum, ið liggja fyri framman.



OM, SUÐURAFRIKA, OM REACH
Tanja og Kurt Abrahams (f)
Hanna 3
Tað var stuttligt at hitta nakrar av fyrrverandi næmingum okkara frá *Reach*, sum nú eru við Logos Hope í uml. tvey ár. Biðið fyri teimum og manningini, sum tey ferðast, at Harrin virkar í teimum og gjøgnum tey eftir vilja Sínum.

9. Mánadagur — *Op. 12.1-18*

DANMARK, Kristnastova
Súsanna og Guttorm Joensen



Takk fyri bønirnar. Vit kenna okkum nýggj í verkinum enn og gleðast um at koma at kenna alt fleiri av teimum, ið koma til møtini. Synir okkara búgva í Ringkøbing og Hoyvík. Vit sakna teir, men gleðast um feriur saman. Eisini eru vit Harranum takksom fyri eina góða heystlegu á Nordsjællands Efterskole.

Susan og Øssur Berghamar
Vit gleðast um skaran av ungum fólki og familjum, sum vit hava sæð á árligu heystleguni, og biðja um, at tey skulu halda á at søkja Harran, trívast og mennast í andaliga lívinum.
berghamar@kristnastova.dk

10. Týsdagur — *Op. 13.1-18*




Atlantic Mission
Í okt. var Ruth Gaardlykke í Hetlandi og Orknoyggjum og tosaði við trúgvandi har fyri at fyrireika eina komandi evangeliseringsferð. Biðið fyri okkum, nú vit arbeiða víðari og skulu taka avgerðir um, hvat vit skulu gera á teimum ymsu støðunum, og hvussu skráin skal skipast.

11. Mikudagur — *Dóm. 1.1-16*

PAPUA NÝGUINEA, Sorimi (fj.arb.)
Carol og Poul Joensen
Minnist okkum, sum vit ferðast til PNG at vitja tey trúgvandi í frumskóginum í Sorimi í 2½ viku. Biðið um varðveitslu á ferðini og um eina serliga góða tíð saman við teimum trúgvandi. Vit bæði skulu undirvísa, tá ið vit koma aftur til North Cotes College.

DANMARK, Glostrup Frikirke



DANMARK, Odense
Árni Helmsdal

DANMARK, Frikirken Bindslev, Jylland

*Í dag fyllir Noah Elias Hansen 15 ár

12. Hósdagur — *Dóm. 1.17-36*

ONGLAND, Personal Support Matters
Claire og Craig Niclasen
Lydia 16



Venjingarskeiðið í Tailandi gekk væl. Har vóru 20 luttakarar, sum tæna í ymiskum asiatiskum londum. Biðið, at skeiðið verður gagnligt í tænastuni at hjálpa trúboðarum at fara og støðast í akrinum. Í nov. undirvísi eg á einum skeiði um at útvega fíggjarligan stuðul og einum um lívsmenning.

ONGLAND, Cornwall
Anna Rodda

13. Fríggjadagur — *Dóm. 2.1-23*

GRØNLAND, Qaqortoq
Marjun og Páll Poulsen

Vit bæði Marjun vóru í okt. knappan mánað í Grønlandi og gingu frá húsum og bátum fyri veturin. Grønlendskir vinir fara at hava eyguni eftir ognunum til komandi summar. Vit hava pakkað okkara privatu ognir, sum koma heim við *Sandfrakt*. Vegna heilsuna

eru okkara dagar í Grønlandi um at verða taldir. Vit takka Harranum fyri tíðina, okkum untist at virka har, og fyri at síggja ávøkstur.



GRØNLAND
Juvel II
Gull-Britt og Karsten Hansen

14. Leygardagur — *Dóm. 3.1-31*

GRØNLAND, Nuuk
Naalakkap Jiisusip Oqaluffia
Hans Sivertsen
Børnini og tey ungu, sum vóru á legu, verða nú boðin til *Naalersitaq Club*, t.e. barnamøti í samkomuni. Fá koma, men biðið, at boðskapurin ber ávøkst í hjørtum teirra. Vit eru ikki so væl mannað í ár.

15. Sunnudagur — *Op. 14.1-20*

GRØNLAND, Qasigiannguit
Solveig og Daniel Kinda
Vit fara aftur til Uganda miðskeiðis í nov. Vit fara at hava fundir við pastor Fred og aðrar pastorar og leiðarar um gongdina og ætlanir fyri framtíðina. Serliga vilja vit venja tey nýggju til lívið í trúnni á Jesus.

FØROYAR
– Elin og Jógvan Jacobsen
– Unn og Jógvan Zachariassen
– Lis Zachariassen
– Annika og Poul Færø
– Anna og Óli Steinberg
– Maria og Jens Bech



16. Mánadagur — *Op. 15.1-8*

FØROYAR
Møtiferð til Rumenia
Ferðin í Rumenia eydnaðist væl. Harrin signaði og opnaði dyr. Gleðiboðskapurin um Jesus Kristus varð borin menniskjum í ymiskum lívsumstøðum, og vit vitjaðu okkara rumensku systkin. Biðið fyri teimum og fyri Orðinum, ið varð sáað.

- **Birgit og Svenning av Lofti**
- **Rutt og John í Skemmuni**
- **Anna og Símun Pætur á Torkilsheyggi**
- **Vanja og Svein í Prestgarði, Terji 14, Petra 11**
- **Birita og Petur á Roykheyggi**



17. Týsdagur — *Dóm. 4.1-24*

INDONESIA
Krissy og Daniel Hansen
Zephaniah 5, Selah Rose 3
Biðið um regn í Indonesia, nú turkur herjar. Nógvir skógareldar eru kring bygdina, og loftið er fylt við royki, so flogfør kunnu ikki lenda í okkara bygd og øðrum støðum kring Papua. Einki vatn er at fáa, hvørki til at drekka, at skola niður ella vaska klæðir. Biðið um vísdóm, nú vit skulu skipa fyri stórum verkætlanum í bygdini.

ÍRLAND, Global Serve International
Guðrun og Ivor Tutty

Mission Aviation Fellowship, MAF Føroyar
Martha og Andrias Hansen
Hannah 0
Hannah varð fødd 2. okt. Hon er glað og frísk. Biðið, at hon trívist og mennist, meðan vit bíða eftir boðum frá MAF.



18. Mikudagur — *Dóm. 5.1-31*

SVEIS, Versoix, Redeemer Grace
Jeanette og Solomon Magura
Reuben 13, Micah 13
Vit eru Harranum takksom, at nýggj høli eru funnin til samkomuna! Hølini skulu tillagast. Biðið um figging og hjálpandi hendur til hetta, og at vit fáa fleiri sunnudagsskúlalærarar.

ITALIA, Molise
Heidi og Regin Guttesen
Trisha 14, Emma 10
Biðið fyri yngru tannáringunum. Alt fleiri vantrúgvandi koma í henda bólkin og hoyra um Jesus!



19. Hósdagur — *Dóm. 6.1-24*

TURKALAND, Istanbul (fj.arb.)
Annika og Stephen Everett
Herfyri vitjaðu vit vinir og samkomur í Istanbul. Teimum tørvar eggjan, serliga tí nógvir langtíðartrúboðarar eru burturvístir. Nú eru mong, sum við turistvisumi tæna í avmarkað tíðarskeið. Vit royna at vitja tvær til tríggjar ferðir árliga í Turkalandi. Alt ger mun. Minnist tey trúgvandi í Istanbul. Mong falla frá eftir stutta tíð, tí familja og onnur leggja stórt trýst á tey.

20. Fríggjadagur — *Dóm. 6.25-40*



PAPUA NÝGUINEA, Kovol
Natalie og Philip Hansen
Louis 9, Timon 7,
Manuel 2, Salome 2

Biðið um regn til kovolfólkið, nú turkur er í PNG. Matgoymslur og gróður minka. Kovollestrarskeiðið hevur gingið væl, og 2. stig er um at enda. Vit eggja nøkrum av útbúnu næmingunum at verða hjálparlærarar á skeiðnum, sum byrjar í jan. Biðið um vísdóm, nú næsta skeiðið verður lagt til rættis, og lærarar til kovollesikunnleika skulu venjast.

21. Leygardagur — *Op. 16.1-21*



FRANKARÍKI, Nantes, OM
Cécile og Jóhannis Mortensen
Sarah 16, Leah 12, Abigail 8

Nýstovnaða samkoman hevur fýra møtir um mánaðin, og bíbliubólkarnir ganga væl. Cécile leiðir ein heima hjá okkum, og eg havi ein online fyri fólk, ið ikki hava møguleika at møta. Biðið fyri barnaítróttarleguni, sum verður í Bretagne. Fíggjarumstøðurnar eru batnaðar, og eg havi betri tíð til samkomutænastu, nú eg einans arbeiði 30 t. um vikuna.

22. Sunnudagur — *Op. 17.1-18*

ONGLAND, European Christian Mission
Dorit og Simon Marshall

Simon kennir seg útbrendan og hevur verið sjúkrameldaður síðan aug. Biðið, at hann skjótt kemur fyri seg at byrja tænastuna aftur.

DANMARK, Skovlunde
Sara og Andrew Berghamar
Lydia 9

23. Mánadagur — *Dóm. 7.1-25*



KENYA, Nakuru, NLAI
Jóna og Billy Hansen
Seinastu 15 árini hava vit ferðast til Nakuru tvær ferðir um árið og arbeitt saman við felagsskapinum NLAI. Endamálið er at geva børnum og ungum skúlagongd og útbúgving, so tey kunnu fóta sær í framtíðini. Í okt. 2025 stovnaðu vit *Esther*-heimið fyri ungar kvinnur undir útbúgving, men sum nú eru ov vaksnar at búgva barnaheiminum. Har fáa tær tryggleika, stuðul og vegleiðing. Biðið fyri børnunum og teimum ungu; fyri *Esther*-heiminum og teimum ungu kvinnunum; starvsfólkunum og øllum, sum stuðla arbeiðnum. Okkum tørvar vísdóm, styrki og leiðslu.

24. Týsdagur — *Dóm. 8.1-17*

PAPUA NÝGUINEA, Mengen
Annika og Simon Flanagan
Noah 17, Karis 13, Judah 11, Ethan 9
Biðið fyri kuyu- og lembenafólkinum, sum hoyra evangeliið fyrstu ferð í ár, um vísdóm fyri PNG økisleiðslutoymið og viðvíkjandi okkara visjón um tættari samstarv við fólkakirkjuna í PNG, fyri mengensamkomuni og um regn, nú turkur og eldar hava oyðilagt garðar. Vegna svongd flyta fólk úr bygdini til størri vatnskeldur. Biðið fyri familjuni og farloyvi okkara um 8 mán. Nya og Noah fara undir lestur ella at finna arbeiði í USA.

PAPUA NÝGUINEA
Lili og Brian Poulsen
Elliot 10, Jude 8, Evelyn 6, Olivia 3

25. Mikudagur ***Dóm. 8.18-35***

SENEGAL, Tongia
Lív Poulsen
Ungi umsetarin Diandiang og ein kvinna eru ofta tey einastu, sum møtast til bíbliutímar. Tey møtast nú á garðinum, har kvinnan býr, og har onkur eisini selur brennivín. Summi, ið keypa, setast við teimum at lurta eftir Orði Guds. Biðið, at tey hava opin hjørtu fyri Orðinum. Biðið fyri mær og Árna, nú vit byrja okkara lívsleið saman. Vit vita ikki heilt, hvussu alt fer at laga seg, og hvat ið er best. Okkum tørvar Harrans leiðslu.

26. Hósdagur ***Op. 18.1-24***

SENEGAL, Dakar
Marion og Hans Arni Jensen
Ryan 17
Vit vóru herfyri uml. 70 fólk til væleydnað skeið um mentan. Ein bíbliutími var um at vaksa andaliga. Mamma Marion datt og breyt mjødnina og hevur nú skift part av mjødnini - skurðviðgerðin gekk væl. Tað hevur regnað illa, kjallarar hava fingið skaða, og bilar eru skolaðir gjøgnum gøturnar. Hjá okkum er eingin skaði. Minnist tey, sum eru rakt, og biðið fyri trygdini at koyra runt í Dakar.

27. Fríggjadagur ***Op. 19.1-21***

TEILAND, Chiang Mai
Corine og Sørin Joensen
Aron 14, Noah Kristian 11
Vit eru stimbrað, soleiðis sum Gud virkar í samkomuni, serliga

nú fólk koma til trúgv. Biðið fyri samkomu okkara í *The Well International*. Í løtuni eru vit ov fá til arbeiðið, og bøn okkara er, at fleiri arbeiðsfólk koma at tæna saman við okkum. Takk, at tit standa saman við okkum í bøn.

VENESUELA, Puerto Ordaz
Nurimar og Jóhannus Frants Poulsen

28. Leygardagur ***Dóm. 9.1-25***

FILIPSOYGGJAR, Naplud (f)
Monika og Tim Sharp
Tim er farin til Filipsoyggjar og kemur aftur 16. des. Hann verður í Puerto Princesa og fer síðan túrar haðani út til ættarbólkar. Málið er at vitja trúgvandi, bæði í Naplud og í øðrum økjum, at eggja tey í trúnni og hjálpa teimum at boða øðrum har um leiðir evangeliið.

FILIPSOYGGJAR, Nayba, NTM
Liz og Ragnar Niclasen.
Takk fyri tíðina heima, fyri blíðskap, samfelag og vinabond. Tað gav okkum áræði at halda fram við bíbliuumseting. Biðið fyri arbeiðnum at útvega kankanaeyfólkinum Orð Guds á egnum máli!

Útgevari	KBS (Kristniboðssambandið)
Blaðnevnd	Róland í Skorini, ábyrgd, Ernst Olsen, Elsa í Skorini, Randi Østerø, Dóra D. Gaard, Kristianna J. Heinesen, Óli Jákup Jacobsen, Jónvør Christiansen, Durita Olsen, Barbara og Ragnar Vest og Sigurð Ó. Vang.
Avgreiðsla	Óla Hendrik av Fløtum, tel. 227057
Uppseting	Grafikmaster, tel. 502022
Myndasavn	info@grafikmaster.fo
Prent	Føroyaprent, tel. 314555
Teldupostur	prayerservicefo@gmail.com
Heimasíða	www.kbs.fo

©KBS. Loyvt er at endurgeva tilfarið, um keldan verður nevnd.

29. Sunnudagur — *Dóm. 9.26-57*

JAPAN
Shino og Hallur Mortensen
Kano 17, Nana 15, Louie 12, Rio 7
Vit vilja gera meira ungdómsarbeiði í samkomuni og hava keypt borðtennisborð til ein ungdómsbólk. Ungdómsarbeiðið í Japan er ikki sum í Føroyum, og okkum tørvar ágrýtni, hugflog og Guds leiðslu.

30. Mánadagur — *Dóm. 10.1-18*

BÓKATÆNASTAN
Biðið fyri bókatænastuni hjá Leirkerinum og Logos Hope.

NÝGGJ BÓK
231 síður 225 kr.



Við trúgv og ágrýtni leiddi Kaleb fólk Guds inn í lovaða landið. Kaleb var eldhugaður maður, sum við orðum sínum nam við hjørtuni á fólki. Ein maður, sum vísti dirvi og áræði í verki og bjargaði mannalívum. Ein trúarinnar maður, sum hevði brennandi kærleika til Gud. Josva tók við sum leiðari fólksins eftir Móses, men tað var eldhugin hjá Kaleb, sum eggjaði fólkinum til at umseta trúgv sína í verk. Í bókini er eisini gjøllig bíbliugransking, sum hóskar væl bæði til egna grundan og til samtalur í bólki.

Páll á Lakjuni týddi.

FORLAGIÐ LEIRKERIÐ
Bílegging á www.leirkerid.fo
Kráargøta 36 • Klaksvík
Tel. 718191 • leirkerid@leirkerid.fo